TAXI av verkstaðnum út í heim

Taxi eru farnir í venjingarlegu. Eftir at hava spælt tvey kvøld í Føroyum, gongur lei›in út um landoddarnar

Mynd: Jens Kristian Vang

DAGFINN OLSEN

TAXI: So rullar hann aftur. Bólkurin vi› manning, i› telist millum landsins dyggastu, og sum gjørdist prix-vinnari í fjør. Bólkurin, sum er verksta›urin hjá frægu tónleikarunum, i› mynda hetta forum.

Hóast Taxi ikki er frammi á palli ella í fjøl-mi›lum alla tí›ina, so merkir ta› ikki, at einki virksemi er í bólkinum. Taxabilurin stendur nevniliga ongantí› stillur. Í hesum døgum eru limirnir í Taxi í Leirvík á venjingarlegu og har ver›a teir, til teir 2. páskakvøld trína á pall í Sjónleikarhúsinum. Seinni fara teir út í heim. (Sí fer›aætlan hjá Taxi)

Spennandi lit

Yngd hevur hitt Taxi til eitt prát, á›renn venjingarleguna í Leirvík.

Eftir Prix Føroyar finaluna var Taxi í Noreg og leika›i. Hetta var partur av vinninginum fyri at gerast best í kappingini.

Nógv hendi í tí›ini eftir finaluna. Taxi var í Danmark, har teir m.a. vóru í sammarhúsinum hjá saxofonleikaranum Jim og vandu og skriva›u. Teir bú›u sí›ani á Brundby Rockhotel, har tónleikarar kunnu gista bíliga og eisini leika. Taxi var eisini í studio og hitti kenda danska produsaran Flemming Hansson, sum teir sí›ani hava samstarva› naka› vi›. Hann er kendur og hevur m.a. samstarva› vi› Gasolin, men hann metti Taxi at hava sera spennandi „lit", sum ta› kallast á fakmáli. Fyri júst einum ári sí›ani hev›i Taxi konsert í Sjónleikarhús-inum, har Flemming miksa›i og har tóku teir eisini upp.

Taxi hevur eisini veri› í Útvarpinum og tiki› tvey løg upp. Hetta er partur av prix-vinninginum, i› eisini inniheldur avtalu um ger av sjónbandi.

Upptiknir

Limirnir í Taxi fjala ikki útyvir, at teir hava Taxi sum ein verksta›, har teir hittast og har alt ber til og kann roynast.

Limirnir gera nógv vi› at taka tilfar upp. Um enn bólkurin ikki er pallvirkin, so hendir allatí›ina okkurt á tí skapandi sí›uni. Løg og tekstir síggja allatí›ina dagsins ljós fyri fyrstu fer›.

Bassleikarin Jón hevur starvast í Danmark seinnu tí›na. Hesa tí›ina, í heyst, hava Kaj, Kim og Magnus veri› í West River studio og tiki› eini 10 løg upp.

Umframt at Magnus smí›ar løg, so er Kim lagsmi›ur fulla tí› og Kaj smí›ar or›. Tí›ina í studio n‡ttu teir sum sonevndan brainstorm, har alt bar til. Teir arbeiddu hesa tí›ina vi› trimmum ymsum stílum ella tónleikaættum. Tí›in var eitt slag av samanumtøku: hvat hava vit og hvat vilja vit?

Verksta›urin hjá búnum rockarum

Limirnir í Taxi hava allir leikt tónleik, sí›ani teir vóru smádreingir. Allir hava teir eini 10 - 15 ár á baki á føroyska pallinum innan bæ›i dansitónleik og rock.

Eisini eru teir millum undangongumenninar í Føroyum, tá ta› sn‡r seg um at taka stigi› fult út og hava tónleikin sum livibrey›.

Magnus Johnnesen leikti á yngri árum vi› Funkies og eisini Plúmm, i› hevur sett dyggan var›a eftir seg í føroysku tónleikasøguni. Fyri nøkrum árum sí›ani bú›leika›ist hann í Danmark og kom sær fram sum tónleikari, t.d. innan sjónleik og sangleik, eittnú Skatteøen. Fyri nøkrum árum sí›ani kom hann heimaftur og hevur sí›ani undirvíst, men var á jólum aftur í Keypmannahavn og leikti vi› til jólauppsetingina á Folketeatret. Hetta fyri at halda sambandi› vi›líka.

Jón McBirnie kom sær ungur fram sum gó›ur bassleikari. Ungi vágbingurin var vi›, tá ungi tvøráma›urin Fró›i saman vi› Deiggj gav plátu út fyrst í áttatiárunum. Sí›ani var hann vi›, tá pápin - Robert - gav út sína plátu í samband vi›, at hann hev›i veri› vi› í føroyskum tónleikalívi í 25 ár. Jón starva›ist mong ár í ÚF sum tøkningur og var eisini vi› sum tónleikari á mongum upptøkum har. Hann hevur eisini framleitt fleiri føroyskar plátur.

Jón er útbúgvin ljó›ma›ur á Filmskúlanum, og starvast í Danmark vi› filmsarbei›i. Tó vitjar hann javnan aftur til Føroya. Sjálvur sigur hann, at hann er eini 70% í Føroyum og eini 30% í Danmark. Jón metir, at innan film fer sera stór menning fram í løtuni innan ta› tøkniliga. Á tøkniliga økinum hevur hinvegin veri› heldur stilt innan tónleikin. Her hevur Jón naka› at geva bólkinum.

Kaj Johannesen er kendur á føroyska pallinum og hevur hann veri› ta› í mong, mong ár. Líka sí›ani Sir Funeral Band og Musketerarnar og hvat alt annars kalla›ist. Hann var eisini vi› á Deiggj plátuni. Seinni gjørdi hann saman vi› Jón Húskallar og kom sí›ani vi› Kim í bólkin Moirae, i› eisini gjørdist prix vinnari.

Kim, i› er yngsti limurin í Taxi, kom fram í seinnu helvt av áttatiárunum, tá hann saman vi› ø›rum nólsoyingum og einum vágamanni leikti vi› í Jóannes og Co. Brátt gjørdist Kim anna› og meira enn ein bakgrundsklaverleikari úr Nólsoy. Hann gjørdist kendur sum Kim úr Nólsoy og brátt bert Kim Hansen ella rætt og slætt Kim. Ma›urin, i› sang og spældi, sum var ta› Elton John ella Billy Joel.

Kim og Kaj undirvísa í tónleiki í Havn og hava seinnu tí›ina fer›ast nógv til Nólsoyar. Kim hevur arva› 8 spor bandupptakaran frá Terja Rasmussen og so hava Kim og Kaj fer›ast teir 20 minuttirnar út til bygdafri›in í Nólsoy, har teir hava lati› kreativu evnini blóma.

Kim kendi fyri tí› sí›ani á sær, at øll tí›in fór til at undirvísa og hevur hann tí sagt naka› av undirvísingartí›ini frá sær, so hann hevur betri stundir til tónasmí›.

Áhugi í Danmark

Alla tí›ina eru limirnir í Taxi virknir. Og stórur dentur ver›ur lagdur á at taka upp. Vi› dugnaliga ljó›maninum Jón í bólkinum liggur eisini væl fyri at gera okkrt munagott á hesum økinum.

Tey bæ›i løgini, sum Taxi festi á band í ÚF, hava fingi› donsk eygu at venda sær mótvegis Taxi. Hvat kemur burturúr ber enn ikki til at siga, men áhugin í Danmark er til sta›ar, hava limirnir í Taxi sta›fest.

Orsaka› av mongu upptøkunum, i› eru gjørdar alla tí›ina, hava Taxi í dag sera nógv tilfar liggjandi og at velja í. Hvørt talan ver›ur um útgávu duga limirnir ikki at siga, tí ta› er ikki ein spurningur um tilfar, men ein spurningur um fíggjarliga orku.

Popparar

Ta› er ikki smávegis, i› kemur fram, tá ein solei›is situr og prátar vi› menn, i› hava veri› virknir á palli í mong ár. Og vit fara ví›a. Men hvussu ber ta› til, at Taxi ikki rodna av at kalla seg popparar? Hví er ta› nú um aldaskifti› blivi› legalt at kalla seg poppara, eftir at hetta at kalla hevur veri› undirmett?

Limirnir í Taxi, i› allir eru uppvaksnir í rocki, eru samdir um, at ta› krevur sín mann at spæla gó›an popp. Fyrst og fremst er Kim ein poppari, eru hinir í bólkinum samdir um.

Limirnir í Taxi ivast onga løtu í, at ta› er meira gevandi at lurta eftir einum poppara, i› dugir sítt, enn at lurta eftir klassiskum ella jazzi, i› er undir mi›al. Taxi er poppur, men sum limirnir siga, so er talan um at duga at siga eina søgu uppá 3 minuttir og at arbei›a innan ein ávísan „trend", i› kanska ikki hevur fingi› fótin fyri seg. Kendur produsari hevur sagt, at poppur er at siga søguna stutt og ta› sn‡r seg um „I love you, I heta you, I go away og I come back"! Og so skal ein ikki gloyma, at tey gó›u løgini ver›a hangandi.

Illima›ur í pottinum

Um hetta vi› legala popparínum hava onkrir í Taxi hug at nevna, talan kann vera um tónleikaslag, i› enn ikki hevur vunni› hevd, men sum ver›ur tiki› í álvara a›rasta›ni. Práti› kemur her inn á gó›tøku og stu›ul. T.d. samanbori› vi› ítrótt ella fótbóltslandsli›, i› kemur aftur hvørjafer› vi› hei›urligum tapi.

Kaj minnir á jantelógina og heldur, at føroyingar altí› snobba ni›ureftir og l‡sir ta› rámandi á sín egna hátt vi› eini skemtisøgu:

Ein ma›ur kom í Helheim. Han sá har stórar, kókandi pottar. Har stó›u illimenn og steyta›u tey ni›ur í aftur, sum royndu at koma sær upp.

Pottarnir vóru merktir: USA, Danmark, Ongland o.s.fr. Á einum potti stó› Føroyar, men har stó› eingin illima›ur og for›a›i nøkrum í at koma upp.

Ma›urin spurdi ovfarin, hví so var.

Svari› var einfalt: hvørjafer› ein roynir at koma sær upp, so hála hinir hann ni›ur aftur!!!

Yngd ynskir Taxi gó›a fer›!

Fer›aætlan hjá Taxi

18. maj: Venjingarlega byrjar í Leirvík. Øll vikan

24. apríl: (2. páskakvøld): Sjónleikarhúsi› í Havn

29. apríl: TB-húsi›

3. maj: Fara úr Føroyum

5. maj: Finnlands Institut, Áland. Útikonsert saman vi› Barkaval og Ville Pussa. Mikkjal Helmsdal er stjóri á Finlands Ins-titutet, i› fyllir 15 ár. Konsertin vi› Taxi er gáva frá Nor›urlandahúsinum í Føroyum.

6. maj: Park Alandia, Mariehamn

9. maj: Fara ví›ari til Finnlands

14. maj: Spæla í Helsinki og Åbo (Nifin skipar fyri). Á kvøldi gongur lei›in til Keypmannahavnar

15. maj fer TAXI í Playground Studio,

17.maj: Magnus leikar saman vi› Anniku Hoydal

20. maj. Taxi í Føroyahúsinum. Nærvarpi› skipar fyri

21. maj: Heimfer›

UK TOP 20 CHARTS

Singles

1 Maria Maria - Santana Featuring Rob Thomas
2 Breathe - Fait Hill
3 Say my name - Destiny´s Child
4 Bye Bye Bye - ´N Sync
5 Thong Song - Sisqo
6 Amazed - Lonestar
7 I Try - Marcy Gray
8 It feels so good - Sonique
9 Everything you want - Vertical Horizon
10 Get it tonite - Montell Jordan
11 Smooth - Santana Featuring Rob Thomas
12 Ther you go - Pink
13 Show me the meaning - Backstreet Boys
14 I wanna know - Joe
15 You sang to me - Marc Anthony
16 That´s the way it is - Celine Dion
17 Never let you go - Third Eye Blind
18 Try again - Aaliyah
19 Only God knows why - Kid Rock
20 Goodbye Earl - Dixie Chicks

Billboard

3 arin

Mest seldu fløgur

1. The Platinum Album - Vengaboys
2. No Strings Attached - N´Sync
3. In Stereo - Bomfunk MC´s
4. Ymiskt - Young Stars 5
5. South Park - Soundtrack
6. Westlife - Westlife
7. SASH - Trilenium
8. Bellamy Broth. - Our Danish Collection
9. Smokie - Celebration
10. Cargo - The moceie goes party
11. Ymiskt - Real Country
12. Enema Of The State - Blink 182
13. Ymiskt - Abuloute Dance 27
14. Creamy - Creamy
15. Ymiskt - Complete Classical Coll
16. Year of the dragon - Modern Talking
17. DR. Hook - A little bit more
18. Jessiva Simpson - Jessica Simpson
19. Savage Garden - Affirmation
20. The Dubliners - 40 Gratest Hits

Kelda: 3´arin

UK TOP 20 CHARTS

Singles

1 Toca´s Miracle - Fragma
2 Fill me in - Craig David
3 Thong Song - Sisqo
4 Flowers - Sveet female attitude
5 The bad touch - Bloodhound gang
6 Blow ya mind - lock ´n´ Load
7 I wanna love you forever - Jessica Simpson
8 Just around the hill - Sash!
9 Never... - Melanie C/Lisa left eye lopes
10 Deeper shade of blue - Steps
11 A song for the lovers - Richard Ashcroft
12 Say my name - Destiny´s Child
13 Freakytime - Point Break
14 Fool again - Westlife
15 Airwave - Rank 1
16 The time is now - Moloko
17 Smooth - Santana ft. Rob Thomas
18 Sister - Sister 2 Sister
19 All the small things - Blink 182
20 The facts of life - Black box recorder

Kelda: BBC

Svara so!?!?!

20 spurningar til R gva Jacobsen

Navn?
R gvi Jacobsen
F¿ddur?
5/3/79
Giftur ella
tr lova ur?
Tr lova ur
Starv?
L ri til elektrikkara
N r byrja i t at
sp la f tb lt?
Eg haldi eg var fimm ella
seks ra gamal
Minningarr kasti
dystur?
Dysturin steypakapp-
ingini m ti TB
Tv¿royri. Enda i
sj krah sinum, av
berum kulda.
Ringasta tap?
Semifinalan um
l¿gmanssteypi 1996.
V ru frammanfyri 5- 3
t tveir minuttir v ru
eftir. Enda u vi at tapa
dystin
F¿roya besti
f tb ltsleikari?
Todi J nsson
Heimsins besti
f tb ltsleikari?
Ginola kemur t tt upp
Heimsins besta
felag?
KÍ
Besti pers nligi
eginleiki?
Ta mugu onnur d¿ma
u m
St¿rsti pers nligi
veikleiki?
Dugi ikki at yrkja
St¿rsta uppliving?
FM 99
St¿rsta v nbrot?
T bilurin ste ga i upp
St¿rsta ynski?
At bilurin fer at koyra
aftur
Hvat er best
sj nvarpinum?
F tb ltur er ta einasta
eg s ggji
Besti matur?
Enskur b ffur
Besti Drykkur?
Mj lk
Hevur t naka
fr t ar triv?
Einki uttan f tb lt
Hevur t naka
motto?
Nei